Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Á TV3 leygarkvøldið kl. 20.00

# Dave



*Sigourney Weaver er í leiklutinum sum forsetafrúan*

Dave Kovis (Kevin Kline) rekur eina avloysarafyritøku og trívist væl við at finna arbeiði fyri onnur. Dave líkist annars amerikanska forsetanum, Bill Mitchell, akkurát. Av hesi orsøk framførir hann av og á alment við at herma eftir forsetanum. Men, so ein dagin ringir amerikanska fregnartænastan. Teir hava brúk fyri hansara tænastu og bjóða honum starv sum "stand-in" fyri forsetan, hetta skal verða liður í trygdararbeiðinum fyri sjálvan ovasta myndugleikanum í USA. Alt gongur sum smurt. Men, so fær forsetin, Mitchell, ein hjartatilburð. Nú er Dave noyddur at taka sær av hesum forsetaleiklutinum í eitt longri tíðarskeið, inntil Mitchell er komin fyri seg aftur. Aftaná at hava sitið í foresetaembætinum í nakrar vikur setur Dave sær fyri at gera sær dælt av hesi heldur ørligu støðu, sum hann er komin í. Okkurt skal gerast við arbeiðsloysið og fátækradømið í landinum. Og so er tað eisini forsetafrúan (Sigourney Weaver), ið Dave dámar rættiliga væl... Við í filminum eru nakrir senatorar og so eisini Oliver Stone. Hetta er ein skemtifilmur frá 1993, ið snýr seg um ein amerikanskan forseta.



*Dave Kovis (Kevin Kline), starvsleiðari, endar í eini heldur ørkymlandi støðu, sum amerikanskur forseti*

# Mickey Blue Eyes

Á Kanal 5 hóskvøldið kl. 20.00



*Michael Felgate (Hugh Grant) er skotin í tí vøkru Ginu (Jeanne Tripplehorn), men fleiri forðingar gera seg galdandi*

Michael Felgate (Hugh Grant) er ein bretskur listakennari, ið rekur eitt vælkoyrandi uppboðsøluhús við serliga virðismiklum listaverkum. Michael er skotin í tí vøkru Gina (Jeanne Tripplehorn), men tá hann biður um hond hennara, fær hann krakk. Hon sigur honum, at hon ongantíð fer at giftast við honum orsaka av familju hennara. Men Michael gevst ikki so og fer at vitja pápa hennara, Frank Vitale (James Caan). Nú sær hann beinanvegin tað, ið Gina var so bangin fyri. Frank er mafiosur og frammanundan hevur hann tikið allar biðlarnar hjá Ginu undir sínar brotsmannaveingir. Frank fær skjótt gott eyga á Michael, men veruligi ovastin í familjuni er gudfaðirin Vito (Burt Young). Hetta hevur við sær at Frank má krevja onkrar smærri tænastur av Michael. Og, júst sum Gina hevði væntað, so er Michael longu í ferð við at reinvaska mafia-pening gjøgnum uppboðsøluhús sítt. Og samstundis gerst hann kendur sum mafiosurin Mickey Blue Eyes úr Kansas City. Tað gerst støðugt meiri trupult at venda aftur til sína vanligu lógligu tilveru - hetta er uttan iva serliga orsakað av at Michael í einum óhappi drepur psykotiska son Vito, Johnny. Og tá Vito fær at vita, at Michael hevur dripið son sín, fær Frank uppgávuna at revsa og beina fyri Michael. Men Frank hevur als ikki hug at gera av við sín egna verson.



*Michael Felgate (Hugh Grant) og Frank Vitale (James Gran*

FILMSTEIGURIN

# Collateral – TAXI DRIVER

Hýruvognsførarin, Max, er vælnøgdur. Hann hevur júst koyrt eitt viðskiftafólk skjótasta vegin, og hon hevur kvittað við einum smíli – og sínum viðskiftakorti. Næsti túrurin tykist eins lovandi. Vincent skal ferðast umvegis L.A., og áðrenn hann fer víðari við flogfarinum, skal hann vitja fimm vinir, so hann tekur bilin fyri alla náttina.

Tað kundi verið ein av teimum heilt góðu túrunum, var tað bara ikki, tí líkið av einum av hesum fimm vinunum hjá Vincent brádliga lendir á bilinum. Vinur er kanska dekan ov nógv sagt, tí skjótt stendur fast, at hesi fimm eru offur, sum leigudrápsmaðurin, Vincent, skal rudda av vegnum.

Tey eru øll fimm vitni í einum sakarmáli móti einum narkodrápsmanni. Max er júst vorðin samsekur í morði, og ger hann ikki júst soleiðis, sum Vincent sigur, verður hann skjótt sætta offurið. Max hugsar sum óður um, hvussu hann skal steðga drápsmanninum, samstundis sum hann sjálvur sleppur livandi burtur úr øllum hesum.

Í leiklutunum síggja vit millum annað Tom Cruise sum ískalda drápsmannin og Jamie Foxx sum sum hýruvognsføraran. Michael Mann hevur leikstjórnað filminum.









Frumsýning
Fríggjadagin 29.10. kl. 20$^{30}$ Fríggjadagin 29.10. kl. 23$^{00}$
Leygardagin 30.10. kl. 20$^{30}$ Leygardagin 30.10. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 31.10. kl. 19$^{30}$ Sunnudagin 31.10. kl. 22$^{00}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Skúlasýningar verða fyriskipaðar
Fríggjadagin 29.10. kl. 19$^{45}$ Leygardagin 30.10. kl. 19$^{45}$
Sunnudagin 31.10. kl. 19$^{00}$




Fríggjadagin 29.10. kl. 22$^{30}$ Leygardagin 30.10. kl. 22$^{30}$
Sunnudagin 31.10. kl. 21$^{30}$




Fríggjadagin 29.10. kl. 18$^{30}$ Leygardagin 30.10. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 31.10. kl. 17$^{30}$

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.